HOFF STOFF

# Vitjaðu prinsar og prinsessur

**Beint eftir døgurða mánadagin var krúnprinsaparið á vitjan á dagstovninum á Hamrinum á Argjum, har tey vóru móttikin av bæði prinsum og prinsessum.**

Hoff Stuff
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Inni á stovunum á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum heilsaðu tey bæði kongaligu upp á fleiri av børnunum og fingu sær eitt prát við tey.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hóast vindurin var tráður á Hamrinum á Argjum seinnapartin mánadagin, hevði heilt fitt av fólki leitað sær niðan til dagstovnin at síggja Fredrik Krúnprins og Mary Krúnprinsessu. Ivaleyst mundi mannfjøldin uttan fyri stovnin telja gott og væl 200 fólk, og tað er einki at ivast í, at ein stórur partur av hesi mannfjøld vóru foreldur at børnunum á stovninum.

Krúnprinsahjúnini góvu sær eisini góðar stundir til at heilsa upp á fleiri av teimum, sum vóru møtt upp, og serliga krúnprinsessan var ófør til at heilsa upp á tey mongu børnini.

### Bíðaðu spent í kuldanum

Tað var týðuligt, at tey mongu børnini á stovninum vóru ógvuliga spent upp á at fáa fínu vitjanina úr kongshúsinum. Summi teirra byrjaðu at gerast eitt sindur ótolin, áðrenn kongaligu gestirnir komu, men tað er væl skiljandi, tá ið tey nú høvdu bíðað so leingi og verið so spent.

Tey flestu av børnunum høvdu gjørt sær sína egnu kongakrúnu, og fleiri høvdu enntá fingið sær ein kappa, so tá ið krúnprinsahjúnini komu, vóru tey móttikin av bæði prinsum og prinsessum.

Tað var Elisabeth Henriksen, stovnsleiðari, ið tók ímóti Fredrik Krúnprinsi og Mary Krúnprinsessu, og hon vísti teimum runt á stovninum. Vitjað var inni á stovunum, og kongaligu gestirnar sluppu eisini at síggja ymiskt handaligt, sum børnini høvdu tilevnað.

Á veg út á Argir høvdu tey kongaligu eisini steðgað á við brúnna um Sandá, har tey sóu gomlu myllluna, og eisini har vóru fitt av argjaborgarum savnaðir.

## Koyrdu í borgarstjórabilinum

Eins og alla aðrastaðnis, har tey kongaligu vitja, stóð stásiligir bilar klárir at koyra tey kongaligu á Sandi, um tey høvdu tørv á tí.

Aðrastaðnis hevur tó verið vanligt, at flestu bilarnir verða fluttir til staðið, har tey kongaligu vitja, men hesaferð var tó eitt sindur øðrvísi. Bilurin, sum flutti drotningina og prinsin, var nevnliga eingin annar enn tann hjá sjálvum borgarstjóranum á Sandi, Páll á Reynatúgvu.

At viðurskiftini eru eitt sindur øðrvísi her á landi enn so nógva aðrastaðnis, sást eisini, tá ið kongaliga vitjanin var liðug. Tá koyrdi borgarstjórin sjálvur bilin, og tá vóru tað nøkur fólk frá útvarpinum, sum fingu loyvi at sita á júst somu setrum, sum drotningin og prinsurin høvdu sitið á stutta løtu frammanundan.

tn

# Rakul handaði Mary blómur

**Tað var sjey ára gamla Rakul, sum fekk heiðurin at handa krúnprinsessuni blómur, tá ið hon kom á vitjan á dagstovninum á Hamrinum mánadagin seinnapartin.**

Hoff Stuff
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Rakul var sum vera man ógvuliga spent at geva krúnprinsessuni blómurnar. Nú nærkast summarfrítíðin, og eftir summarfrítíðina fer Rakul í skúla. Tískil var henda uppgávan eitt tað seinasta, ið Rakul slapp at gera á dagstovninum. Rakul var eisini spent upp á at fara í skúla, og hon fortaldi okkum, at hon helst fór at ganga í Venjingarskúlanum.

Tá ið vit spurdu Rakul, um hon visti, hvør ið Mary var, ivaðist hon ikki: - Tað er prinsessan!, segði Rakul. Sjey ára gamla gentan visti eisini gott, hvussu krúnprinsessan sær út, tí hon hevur fleiri ferðir sæð hana í sjónvarpinum.



*Sjey ára gamla Rakul var ógvuliga spent uppá at skula handa Mary Krúnprinsessu blómur, tá ið hon kom á vitjan á dagstovninum á Hamrinum á Argjum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*